UTTAN ÚR HEIMI

## Kom ongan veg við Sellafield

Fyrrverandi norski forsætisráðharrin, Jens Stoltenberg, fekk ikki nógv burturúr, tá hann týsdagin royndi at fáa bretska forsætisráðharran, Tony Blair, at steðga útlátinum frá kjarnorkuendurvinningarverkinum Sellafield.

Stoltenberg var í London og hitti Blair í Downing Street nr. 10, og eitt av ørindum hansara var at ávirka bretska stjórnarleiðaran at steðga útlátinum í Sellafield. Men aftan á fundin mátti Stoltenberg viðganga, at hesum hevði hann einki fingið burturúr. Eftirmaður Stoltenbergs í norska forsætismálaráðnum, Kjell Magne Bondevik, hevur eisini tosað við Blair um Sellafield, men til fánýtis.

Fyrr í vikuni gjørdi Írland av at stevna Bretlandi fyri altjóða dómstólin í Haag. Írar vilja hava innlit í tvær frágreiðingar um Sellafield-verkið, men tað hava bretar sýtt teimum. Nú skal dómstólurin viðgera írska kravið.

## Skip tikið fyri smugling

Myndugleikarnir í Pólandi hava lagt hald á danska farmaskipið "Lake Pejo", tí illgruni er um, at skipið smuglaði sigarettir. Skiparin á danska skipinum er varðhaldsfongslaður í tríggjar mánaðir.

Pólendingar siga, at danska skipið segði seg vera á veg til russiska Kaliningrad, men at tað kortini vendi og fór inn í eina polska havn. Tá tollarar og løgreglumenn fóru umborð á skipið, funnu teir tvær bingjur við fleiri hundrað túsund sigarettum.

Danska reiðaríið, sum eigur "Lake Pejo" heldur uppá, at hvørki tað ella skiparin vistu nakað um tær ólógligu sigarettirnar, og uttanríkisráðið í Keypmannahavn roynir nú at fáa skiparan úr polska varðhaldinum.

## Fangar latast leysir

Amerikansku myndugleikarnir hava nú gjørt av at lata nakrar av fangunum í Guantanamo leysar. Tað segði Donald Rumsfeld, verjumálaráðharri fyrradagin.

Sambært ráðharranum er talan um fangar, sum ikki hava áhuga hjá amerikanrunum longur, men hann dugdi ikki at siga, hvussu nógvir fangar verða latnir leysir. USA hevur 589 fangar sitandi í Guantanamo á Kuba, og hildið verður, at fleiri pakistanar eru millum teirra, sum verða latnir leysir nú. Teir vórðu eins og hinir fangarnir tiknir í Afghanistan.

Donald Rumsfeld gjørdi eisini greitt, at teir fangarnir, sum verða latnir leysir nú, verða ikki rættarsøktir.

## Sita ikki kortini

Ríkisadvokaturin í Svøríki, Klas Bergenstrand, mælir nú til at broyta revsilógina, so reglan um lívlanga fongsulsrevsing verður tikin úr lógini.

Í samrøðu við Svenska Dagbladet sigur ríkisadvokaturin, at tað er eingin grund til at hava regluna, tí hon verður ongantíð fylgd kortini.

Í Svøríki kunnu fangar, sum hava fingið lívlanga fongsulsrevsing, biðja stjórnina um grið, og vanligt er, at revsingin verður sett til millum 18 og 25 ár.

# Nú hóttir hann eisini við at skjóta børn

**Næstan 1.000 løgreglumenn og onnur leita eftir snigskjúttanum í Washington. Nú hóttir hann eisini við at skjóta eftir børnum.**

SNIGSKJÚTTAMÁLIÐ
*Árni Joensen:*



*Foreldrini tora illa at lata børnini fara út. Her hjálpir ein løgreglumaðu r einari kvinnu og einum barni yvir um vegin í Aspen í Maryland.*

– Børn tykkara eiga ongantíð at kenna seg trygg!

Hetta vóru boðini frá snigskjúttanum, sum Chalres Moose, løgregluovasti í Montgomery las fyri fjølmiðlafólki, tá hann fyrrakvøldið kunnaði tey um tað seinasta, sum var hent í snigskjúttamálinum.

Ovastin vildi ikki siga, hvussu og nær løgreglan hevði fingið fatur á boðunum, men keldur innan løgregluna søgdu, at boðini stóðu í einum brævi, sum løgreglan hevði funnið.

Boðini frá snigskjúttanum elvdu til, at skúlamyndugleikarnir gjørdu av at steingja fleiri skúlar.

Nakrar fáar tímar frammanundan hevði snigskjúttin aftur latið frætta frá sær, tá hann skeyt ein 40 ára gamlan bussførara við Connecticut Avenue í Silver Spring. Maðurin varð raktur í bringuna og doyði á sjúkrahúsi tveir tímar seinni. Hóast løgreglan ikki hevði kannað kúluna, sum varð funnin í líkinum, tóktist eingin ivi vera um, at tað var snigskjúttin, sum hevði skotið bussføraran.

### Í øðini

Umleið 1.000 fólk hjá løgregluni, samveldisløgregluni FBI og teirri serligu trygdartænastuni leita nú eftir snigskjúttanum, og javnan verða fólk biðin um at siga frá, varnast tey okkurt óvanligt. Men hóast løgreglan hevur fingið fleiri túsund fráboðanir, hevur eingin teirra givið nakað úrslit enn.

Fólk uttan fyri Washington eru ræðsluslig in, men samstundis eru mong teirra í øðini um, at myndugleikarnir ikki megna at finna snigskjúttan. Tey flestu hava gloymt alt um bin Laden og Saddam Hussein, tí sambært løgregluni er tað ein av teirra egnu landsmonnum, sum nú er drápsmaðurin.

## OFFUR SNIGSKJÚTTANS:

**James Martin**
Skotin og dripin á einum bilplássi í Wheaton í Maryland klokkan 18.04 mikudagin 2. okt.

**Sonny Buchanan**
Skotin og dripin við Bethesda í Maryland klokkan 07.41 hósdagin 3. okt.

**Prem Kumar Walekar**
Skotin og dripin á einari bensinstøð í Montgomery County í Maryland klokkan 08.12 hósdagin 3. okt.

**Sarah Ramos**
Skotin og dripin uttan fyri eitt posthús við Silver Spring í Maryland klokkan 08.37 hósdagin 3. okt.

**Lorri Ann Lewis-Rivera**
Skotin og dripin við eina bensinstøð í Kensington í Maryland klokkan 09.58 hósdagin 3. okt.

**Pascal Charlot**
Skotin og dripin á Georgia Avenue í Washington klokkan 21.15 hósdagin 3. okt.

**43 ára gomul kvinna**
Skotin og særd uttan fyri ein handil í Fredericksburg í Virginia fríggjadagin 4. okt. Liggur á sjúkrahúsi.

**13 ára gamal drongur**
Skotin og særdur uttan fyri Benjamin Tasker Middle School mánadagin 7. okt. Liggur á sjúkrahúsi.

**Dean Harold Meyers**
Skotin og dripin við eina bensinstøð í Manassas í Virginia mikudagin 9. okt.

**Kenneth H. Bridges**
Skotin og dripin við eina bensinstøð í Fourmile Fork í Virginia fríggjadagin 11. okt.

**Linda Franklin**
Skotin og dripin uttan fyri ein handil 16 kilometrar vestan fyri Washington D.C. mánadagin 14. okt.

**37 ára gamal maður**
Skotin og illa særdur á einum bilplássi í Ashland í Virginia leygardagin 19. okt.

**Conrad Johnson**
Skotin og dripin á einum bussstaði í Aspen Hill uttan fyri Washington týsdagin 22. okt.

# Ísrael vrakar enn eina friðarætlan

**Ísraelski forsætisráðharrin, Ariel Sharon, vrakaði í gjár ta seinastu friðarætlanina, sum amerikanski forsetin, George W. Bush, legði fyri hann í síðstu viku.**

MIÐEYSTUR
*Árni Joensen:*

Tað var á einum fundi við amerikanskar jødar, sum vóru á vitjan í Ísrael, at Ariel Sharon, forsætisráðharri gjørdi greitt, at hann kann ikki góðtaka ta nýggju amerikansku friðarætlanina. Sambært forsætisráðharranum áleggur friðarætlanin Ísrael at fylgja einari diplomatiskari leið fram ímóti varandi friði, meðan palestinar ikki fáa somu boð.

– Tað kann vera vandamikið fyri land okkara at játta at fylgja einari tíðarætlan, sum bara verður áløgd okkum, segði Sharon á fundinum sambært blaðnum Haaretz.

Uppskotið, sum Bush forseti legði fyri Sharon í síðstu viku, er grundað á eina semju millum ta sonevndu Miðeysturkvartettina, sum ST, ES, USA og Russland manna. Sambært uppskotinum skulu ísraelsmenn taka seg aftur úr teimum palestinsku sjálvsstýrisøkjunum, og allir ólógligir búreisingar skulu flytast burtur. Sambært haaretz hava bæði politiskir og hernaðarligir leiðarar í Ísrael mælt stjórnini frá at góðtaka uppskotið.

Uppskotið hjá Miðeysturkvartettini mælir eisini til umfatandi nýskipanir innan teir palestinsku sjálvsstýrismyndugleikarnar, og at tað komandi palestinska ríkið skal hava eitt fyribilsmark innan árslok næsta ár.

Serligi amerikanski miðeystursendimaðurin, William Burns, kom til Ísraels í gjár, har hann skuldi tosa við Ariel Sharon, forsætisráðharra, Shimon Peres, uttanríkisráðharra og Benyamin Ben-Eliezer, verjumálaráðharra um tað seinasta friðaruppskotið. Eftir at hava hitt teir tríggjar skal William Burns hitta palestinska leiðaran, Yasser Arafat.

Ariel Sharon, forsætisráðharri hevur fyrr bent á, at hann var ikki serliga fegin um tað seinasta friðaruppskotið. Sunnudagin segði hann, at hann var til reiðar at lesa tað ígjøgnum, men meiri vildi hann ikki siga. Nú hevur hann so víst tí frá sær.

Sambært Haaretz skal forsætisráðharrin hava sagt, at júst nú hevur tað størri týdning at fáa enda á palestinska yvirganginum enn at tosa um frið.



ítróttur
Nr. 204 • hósdagur • 24. oktober 2002 • 76. árgangur • www.sosialurin.fo

# Firma kapping í Triathlona

**Sunnudagin verður FM-kappingin í 1/4-triathlon, og sum nakað nýtt verður samstundis skipað fyri firma-kapping í krevjandi ítróttargreinini**

TRIATHLON
*Jákup Mørk*

Føroya Triathlon Felag skipar sunnudagin 27. oktober kl. 13.00 fyri FM í 1/4 Triathlon. Kappast verður hesaferð á sokallaða OL-teinurin, sum er 1500 m svimjing, 40 km súkkling og 10 km renning.

Fyri at økja um áhugan fyri hesi ítróttagrein, nú stundar til Oyggjaleikir, bjóðar FTF einstaklingum, stovnum og feløgum við til kappingina.

Fyri ikki heilt at ræða fólk, er avgjørt at stovnar og fyritøkur kunnu vera við sum lið t.v.s. at ein svimjari, ein súkklari og ein rennari sláa seg saman og umboða fyritøkuna, og kappast á sprint teininum.

Best er sjálvandi um allir lið- íðkararnir eru frá somu fyritøku, men hetta er tó eingin treyt.

Teinarnir, sum kappast verður í, eru fleiri í tali. Hjá teimum, sum kanska droyma eina Oyl-luttøku, verður talan um 1/4-triathlon. Har skulu luttakararnir fyst svimja 1.500 í svimjihøllini. Síðani skulu 40 km súkklast eftir Ringvegnum, Hvítanesvegnum og Kaldbaksvegnum, og endiliga skal rennast. Í alt verður talan um ein rennitúr á 10 km, og verður hesin runnin eftir vegnum yviri við Strond.

Talan verður eisini um kappingar á sprint-teininum, sum er 1/8-partur av vanliga triathlon teininum. T.v.s. at svimjingin er 750 metrar, súkklingin 20 km og renningin 5 km. Tað er eisini í hesi kappingini, at kappast verður millum virkini, har hvørt virki hevur tríggjar luttakarar, sum so skiftast um at taka sær av ymsu teinunum.

At enda verður so eisini ein av teimum heilt stuttu kappingunum, har teinirnir eru 1/12-partur av veruliga iron-man teininum. Tað merkir, at 300 metrar skulu svimjast, 10 súkklast og 2,5 skulu rennast.

Íðkararnir skulu møta í Svimjihøllini 1 tíma áðrenn kappingin byrjar.

Um ikki ber til at finna eina hóskandi súkklu, so er at ringja, og FTF finnur eina.

Nú kappingin verður so seint á árinum, er umráðandi at íðkararnir eru væl klæddir, tí er veðrið ikki til vildar, kann túrurin gerast møðsamur og ógvuliga kaldur, so best er at binda um heilan fingur.



*Súkklingin er ein av teimum trimum ítróttagreinunum í triathlon-kappingini, har FM og firmakapping eru á skránni nú komandi vikuskiftið*

# Badminton á Kambsdali

Um vikuskiftið varð Daewoo-Open kappingin í badminton hildin á Kambsdali. Kappast varð bæði leygar- og sunnudagin, og vóru tað børn og ung upp til 18 ára aldur, sum kappaðust.

Sum heild var talan um eina væl eydnaða kapping, og niðanfyri sýna vit yvirlit yvir fremstu leikararnar í ymsu aldursbólkunum.

**Gentur, U-9**
1 Vár Rógvadóttir, VÍF
2 Randi V. Hansen, VÍF
3 Birita Poulsen, VÍF

**Dreingir, U-9**
1 Leivur Joensen, ÍF
2 Rúni Hentze, ÍF
3 Magni Hansen, ÍF

**Gentur, U-11**
1 Fjóla Luid, HBF
2 Tanja í Dali, VÍF

**Dreingir, U-11**
1 Fríði Lamhauge, HBF
2 Bogi R. Petersen, ÍF
3 Ari Ó. Ellingsgaard, ÍF

**Gentur, U-13**
1 Brynhild Carlson, HBF
2 Rannvá Lava Olsen, ÍF
3 Guðrun Lervig, ÍF

**Dreingir, U-13**
1 Reidar Luid, HBF
2 Heri Nesá, ÍF
3 Jan Ó. Ellingsgaard, ÍF

**Gentur, U-15**
1 Ulla í Dávastovu, VÍF
2 Rannvá á Rógvu, VÍF
3 Kristina Eriksen, VÍF

**Dreingir, U-15**
1 Niklas Eysturoy, HBF
2 Hilmar Kass, HBF
3 Bjarki Gram, HBF

**Gentur, U-18**
1 Sára Arge, HBF
2 Anna Katrina Arge, HBF
3 Lis, VÍF

**Dreingir, U-18**
1 Niklas Eysturoy, HBF
2 Gunnar Poulsen, HBF
3 Thomas Hans HBF




*Vestmanna hevur fleiri evnaríkar ungar leikarar, og millum annað áttu tey allar tær fremstu hjá U-9 gentunum. Frá vinstru eru tað Randi V. Hansen, Vár Rógvadóttir og Birita Poulsen*




*Tað gjørdust tríggir fuglfirðingar, sum endaðu ovastir hjá yngstu dreingjunum. Frá vinstru eru tað Rúni Hentze, Leivur Joensen, sum vann kappingina, og Magni Hansen*